UTTAN ÚR HEIMI

## Statoil fyri atfinningum

Mannarættindafelagsskapir halda, at oljufelagið Statoil eigur at gera vart við tey nógvu brotini á mannarættindini í Aserbajdjan.

Statoil hevur gjørt íløgur fyri 12 milliardir krónur í Aserbajdjan. Fleiri onnur oljufeløg hava eisini gjørt stórar íløgur har, og tey hava heldur ikki sagt eitt orð um framferðina hjá myndugleikunum, sigur NRK. Okkurt bendir eisini á, at myndugleikarnir í Aserbajdjan tann stóra útlendska áhugan fyri oljuni.

- Hví skluldi Noreg lagt trýst á meg? Noreg er í einari slíkari støðu, at landið kann ikki leggja trýst á meg, sigur forsetin sambært tíðindastovuni ANB.

## Avmarkað síðustarv

Í fjør avdúkaðu danskir fjølmiðlar, at dómararnir í Hægstarætti forvinna líka nógvar pengar í frítíðini sum í arbeiðstíðini, men nú hevur Lene Espersen, løgmálaráðharri, gjørt av at avmarka eykainntøkurnar hjá dómarunum.

Í fjør forvunnu dómararnir í Hægstarætti 770.000 krónur í meðal umframt ta føstu inntøkuna. Pengarnar fáa teir sum samsýningar fyri at sita í nevndum og ráðum, og harafturat eru teir ofta við til at loysa trætur ímillum privat feløg.

Lene Espersen sigur, at dómararnir skulu framvegis hava loyvi at átaka sær aðrar uppgávur enn tær í Hægstarætti, men at myndugleikarnir mugu seta mark fyri, hvussu nógv teir kunnu átaka sær. Hon hevur tí orðað eitt lógaruppskot, sum skal avmarkað eykaarbeiðið hjá dómarunum, og tað verður ætlandi lagt fyri Fólkatingið, tá tað kemur saman aftur týsdagin í næstu viku, skrivar Politiken.

## Flogfar roynast í kulda

Evropeiska Airbus-flogverksmiðjan er í ferð við at royna tað nýggja Airbus A380-flogfarið, sum var sín fyrsta royndartúr í vár.

Í næstum er ætlanin at vita, hvussu flogfarið roynist í nógvum kulda. Í hesum sambandi hevði flogvøllurin í Narvik í Noregi boðið flogfarinum hagar at gera royndirnar, men hetta verður helst av ongum, skrivar Aftenposten. Á verksmiðjuni í Toulouse siga tey, at ætlanin er at gera kuldaroyndirnar í Sibir ella í Kanada og møguliga í báðum støðum, og at tað helst verður tíðliga næsta ár.

Síðani royndartúrin 27. apríl hevur Airbus A380 verið einar hundrað ferðir í luftini í sambandi við ymsar royndir, og fleiri royndir skulu gerast afturat, áðrenn verksmiðjan fer undir at byggja flogfør til tey nógvu feløgini, sum longu hava bílagt tey.

Nýggja flogfarið hevur pláss fyri 555 ferðafólkum.

## Danskir loðsar strongdir

Loðsarnir í Danmark hava so nógv at gera og so nógva yvirtíð, at tað er vandamikið fyri trygdina á sjónum. Tað er niðurstøðan í einari nýggjari kanning, sum Søfartens Arbejdsmiljøråd hevur gjørt.

Tað er Farvandsvæsenet, sum hevur ábyrgdina av arbeiðsumstøðunum hjá loðsunum, og Svend Eskildsen, stjóri, viðgongur, ar arbeiðsbyrðan hjá loðsunum er ein stórur trupulleiki.

- Skipini, sum skulu hava loðs, eru vorðin munandi fleiri í tali, og tað ger, at loðsarnir hava úr at gera. Tað vísir seg eisini at vera trupult hjá loðsunum at fáa ta frítíð og hvíld, sum teir hava rætt til, og tað er ein trupulleiki, sum vit noyðast at loysa, sigur Svend Eskildsen við Politiken.

# ES kann fella komandi norsku stjórnina

**Kemur eitt uppskot um ES-limaskap í Stórtingið, og Arbeiðaraflkokkurin tekur undir við tí, fellur stjórnin**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Samráðingarnar ímillum Arbeiðaraflokkin, Sosialistiska Vinstraflokkin og Miðflokkin í Noregi um at skipa stjórn halda fram. Sum skilst hava flokkarnir higartil tingast um tey málini, sum teir hava lætt við at semjast um so sum heilsumál og skúlamál.

Men flokkarnir sleppa ikki undan teimum tungu málunum. Eitt teirra er norsk luttøka í hernaðarligum tiltøkum uttanlands, og hetta málið kann gerast trupult at loysa, tí nógvir stuðlar hjá Sosialistiska Vinstraflokkinum krevja, at Noreg skal taka sínar hermenn úr Afghanistan og Irak. Arbeiðaraflokkurin og Miðflokkurin halda harafturímóti, at teir norsku hermenninir skulu verða verandi í Afghanistan, men Arbeiðaraflokkurin er fyri at taka hermenninar úr Irak.

Ein annar spurningur, sum flokkarnir eru ósamdir um, er, at norskur limaskapur í ES. Arbeiðaraflokkurin tekur undir við limaskapi, men formaðurin, Jens Stoltenberg, hevur tó sagt, at spurningurin er ikki viðkomandi, fyrr enn ein meiriluti av norska fólkinum tekur undir við, at Noreg skal fara upp í Evropasamveldið.

Men her er eingin slingur í politiska valsinum hjá hinum báðum flokkunum, og teir krevja, at ein sokallað "sjálvmorðsregla" skal standa í samgonguskjalinum. Í henni skal standa, at stjórnin er upployst í teirri løtu, Arbeiðaraflokkurin fer at finglast við tankan um ES-limaskap.

- Sjálvmorðsreglan skal í samgonguskjalið, og eingin skal vera í iva um, at stjórnin fer frá, kemur spurningurin um ES-limaskap á dagskránna, segði forkvinnan í Miðflokkinum, Aslaug Haga, týsdagin.

Lítið og einki er likið út frá samgongusamráðingunum. Tað einasta, sum er greitt, er, at Jens Stoltenberg verður forsætisráðharri.

# Noyddist frá eftir ákæru um svik



*Tom DeLay kann fáa tvey ára fongsul, verður hann funnin sekur í sviki*

**Leiðarin hjá republikanarunum í amerikonsku Kongressini, Tom DeLay, er ákærdur fyri svik**

ÁKÆRA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ákæran kemur republikanska flokkinum sera illa við, tí Tom DeLay er ikki tann einasti republikanski topppolitikarin, sum er sett- ur í samband við svik. Herfyri kunngjørdi løgreglan, at hon er í ferð við at kanna, um republikanski formaðurin í Senatinum, Bill Frost, breyt lógina um innanhýsis vitan, tá hann seldi partabrøv í einari fyritøku, sum hann er medeigari í.

Tom DeLay hevur sagt seg úr formansstarvinum í Umboðsmannatinginum og Kongressini. Løgreglan vil vera við, at hann hevur svikað við pengum, sum hann fekk til tað seinasta valstríðið, og verður hann funnin sekur, kann hann fáa upp í tvey ára fongsul.

Sjálvur heldur Tom DeLay uppá, at hann er ósekur. Hann sigur við CNN, at talan er um politiskan ágang frá ákæranum í Texas, Ronnie Earle, sum er demokratur.

- Hetta er bara enn eitt dømi um, hvussu Ronnie Earle misbrúkar sítt starv sum ákæri, sigur Tom DeLay.